# Bilar

**Magnus Gunnarsson**
*maggi@sosialurin.fo*






**Í sambandi við altjóða eldradagin, sum er 1. oktober, verður ein framsýning av ellisakførum í niðaraparti av Tórsgøtu frá kl. 13.00 til kl. 16.30 tann dagin.**

Tað er Eldraráðið í Tórshavnar kommunu, sum skipar fyri eldradegnum undir heitinum "Virkin og vakin". Tórsgøta verður stongd fyri allari ferðslu frá handlinum P/F Maria Poulsen og oman í Vágsbotn, har limir í áhugafelagnum Føroya Ellisakfør sýna fram bilar og motorsúkklur.

Eldradagurin byrjar kl. 10 um morgunin , tá Heðin Mortensen, borgarstjóri, setur dagin, og Mortan Rasmussen, formaður í eldraráðnum hevur orðið.

Annars verða onnur tiltøk og framførslur á Tjóðpalli Føroya, á Gamla Reinsaríi og í Perluni, umframt at matiné verður í Dómkirkjuni. Meira upplýsingar eru á heimasíðuni www.torshavn.fo

*Mortan Rasmussen, formaður í eldraráðnum í Havn, við einum Ford A frá 1930 hjá Eiriki Lindenskov*

# Eldradagur við ellisakførum


BILRADIO

Aktuel bilítíðindi við Maggi Gunnarsson

## Hósdagin 30. september kl. 17.10

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin 30. september er samrøða við Kristian Krapper, stjóra hjá Toyota Danmark, sum saman við japanska stjóranum í Toyota Nordic vitjaði hjá Reyni Service.

Í sambandi við altjóða eldradagin, sum er 1. oktober, er samrøða við Mortan Rasmussen, formann í eldraráðnum í Havn, um eina framsýning av ellisakførum í Tórsgøtu.

Mánadagin 20. september 2010 kom Harley Davidson súkkla nummar 100 í land í Havn. Í hesum sambandi er samrøða við Ova Ritter frá Harley Davidson í Føroyum.


Mortan Rasmussen

Kristian Krapper


Ove Ritter


# Toyota toppfundur

Í síðstu viku hevði Reyni Service vitan av danska stjóranum fyri Toyota í Danmark og japanska stjóranum hjá Toyota í Norðurlondum umframt tveimum øðrum leiðarum hjá Toyota í Danmark.

Kristian Krapper, stjóri hjá Toyota Danmark sigur í samrøðu í Bilradio á Rás2 at fasilitetirnir og tænastan hjá Reyni Service er á sera høgum støði og er fult á hædd við aðrar Toyota bilasølur í Danmark og í Evropa.



*Kristian Krapper, stjóri hjá Toyota Danmark, og Ichiro Ogiso presidentur hjá Toyota Nordic*




*Frá vitjanini f.v.: Sámal av Reyni frá Reyni Service, Ichiro Ogiso presidentur hjá Toyota Nordic, John B. Hansen frá Toyota Danmark, Eivind og Sigrun av Reyni frá Reyni Service, Kristian Krapper stjóri hjá Toyota Danmark, Jørgen Eg Andersen frá Toyota Danmark og Árni Rasmussen stjóri hjá Auto Service*